**<u>Ásetingar fyri øki B5: Sethúsaøki – serstøk byggisamtykt</u>**

**Sethúsaøki við Olivarsveg og Dagmarsgøtu í Miðvági**

Byggingin skal gerast sambært teimum alment galdandi krøvunum fyri bygging í Vága kommunu, við niðanfyrinevndu herðingum.

Víst verður til kortskjøl til byggisamtykt - plantekning nr. Ú(40.1)3.1 og skurðteknigar A-A til G-G nr Ú(40.1)8.1 og Ú(40.1)8.2.

Øki, har byggjast kann á, er víst við reyðari markering. Uttanfyri byggiøki kann einans gevast loyvi til bygging av í mesta lagi 2 smáum bygningum (t.d. úthús, hjall o.a.) upp til 10$m^2$ og í mesta lagi 3m høgar. Hesir skulu tá staðsetast á norðaru helvt av stykkinum, í minsta lagi 12m frá sunnara marki á stykkinum.

Hæddir á stykkjum skulu avsetast hvør sær, út frá punktum mitt á vegnum. Kotan fyri lidna veghædd er merkt fyri hvørjar 10m eftir vegnum á kortskjalinum til serstøku byggisamtyktina.

Stykki skulu planerast í hædd, sum víst á tekning. Liðug planeringshædd skal ikki verða hægri ella lægri enn 10 cm í mun til ásettu hæddirnar.

Byggjast kann upp til hæddirnar sum vístar á tekning. Eingin bygging kann verða hægri enn hesar hæddir, skorsteinur tó undantikið.

Um grivið verður nærri enn 5 m frá bakkanti á gongubreyt ella vegi, hevur eigarin av stykkinum, har grivið verður, ábyrgdina av at tryggja vegin og at tryggja, at veggurin á húsum niðan móti vegnum, klárar trýstið frá vegnum við ferðslu. Kommunan ber ongar útreiðslur av garði ella stuðlamúri, sum stendst av hesum.

Á grundøkjunum norðanfyri veg C verður loyvt at byggja ketu- ella raðhús, har grundstykkini eru minst 300m2 fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum, har nettonýtingarstigið ikki má fara upp um 0,4.

Á grundøkjunum sunnanfyri veg A skulu verða bygd hús við fullum kjallara og lágari reising.

Nóg stórt øki skal vera lagt av til bilstøðlar, soleiðis at íbúgvar og vitjandi fáa sett akfarið frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini. Pláss skal vera til tríggjar bilar til hvørt grundøki. Eru tveir bústaðir í einum sethúsum, skulu vera tvey parkeringspláss til hvønn bústað.